# Semja millum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið

Viðvíkjandi avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar/motorpassarar við vaktarskipum.

1. § 20 Avtalan verður endurnýggja fyri tíðarskeiðið frá 1. okt. 2019 til 31. sept. 2022.

2. Broytingar í samsýning sum eru framdar sambært øðrum semjum:

Vaktargjøldini fylga sáttmála fyri maskinmeistarar á landi og vera tí broytt tann 1. januar 2021.

- Vaktargjald 1 verður broytt til : 26,94 kr.
- Vaktargjald 2 verður broytt til: 53,88 kr.

3. Broytingar í avtaluni:

Nýtt stk. 4 í § 4. Úrtíðarlønir

Verður í mistu avspaseringstíðini eftir stk. 3 arbeitt í meira enn 12 tímar um samdøgrið (vaktarbrot) verður latin úrtíðarløn 1 fyri 13. og 14. tíman og úrtíðarløn 2 fyri eftirfylgjandi tímar, so leingi arbeitt verður.

Nýtt Stk. 4. í § 14. Skipan fyri skipsmaskinmeistarar uttan gildugt vinnubræv

Setanin og ásetingarnar eru galdandi í tíðarskeiðinum til viðkomandi hevur siglt sær til fyrsta vinnubrævið, ið er "Vakthavandi maskinyvirmaður" (STCW III/1). Tó ber til eftir avtalu at leingja hesa setanina við somu ásetingum at galda, til viðkomandi maskinmeistari hevur siglt sær vinnubrævið STCW III/3 til. Lønin verður tá tillaga frá 75% til 80 % á sama stigi og flokki.

Um viðkomandi heldur fram í starvi eftir hetta, er tað at meta sum nýggj setan, har sáttmálaviðurskiftini og lønin verða sambært vanligu ásetingunum í sáttmálanum.

§ 15. Aspirantar/atstøðisnæmingar verður soljóðandi:

Um aspirantur ella atstøðingur er undir útbúgving, ið er fevnd av lestrastuðulskipan, áliggur tað ikki reiðarínum at gjalda løn, men bert fyri mat og vistarhald. Er útbúgvingin ikki fevnd av lestrarstuðulsskipan er lønin kr. kr.7.000 um mánaðin.

4. Avtálan verður dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

Tórshavn tann 18. september í 2020

Maskinmeistarafelagið

Fíggjarmálaráðið